# BBC avdúkar mótaheimin

*Rasisma, rúsevni og kynsligt misbrúk verður drigið fram, tá mótaheimurin verður úrlatin í BBC-sending, sum verður send í SvF í kvøld*

Stutt fyri jól avdúkaði ein sending hjá BBC ymisk viðurskifti í mótaheiminum, sum tað vanliga ikki verður tosað so nógv um.

MacIntyre Undercover vísti, at rasisma, rúsevni og kynsligt misbrúk av ungum modellum er vanligt í mótaheiminum. Nakrar av heimsins størstu mótafyritøkur komu í andglettin, og sendingin hevði við sær, at fólk í fleiri fyritøkum vórðu søgd úr starvi.

MacIntyre Undercover hevur brúkt loyniligar upptøkur fyri at staðfesta, hvussu leikur fer í mótaheiminum.

Sendingin vísir, at ein stjóri hjá Elite Model Look tosar niðursetandi um afrikansk lond og um myrkar modellir.

Ein umboðsmaður fyri fronsku fyritøkuna Marilyn Models verður tikin upp á sjónband, meðan hann letur eini kendari bretskari modell kokain. Marilyn Models royndi at steðga hesum myndunum, men eftir sendingina fingu bæði umboðsmaðurin og modellin durafjórðingin.

Fyrsta reaktiónin hjá Elite Models var eisini ein hóttan um eina stevning, tí sendingin byggir lutvíst á loyniligar upptøkur, sum felagið helt verða ólógligar. Men eisini Elite hevur sagt fólki upp eftir avdúkingarnar í sendingini.

### Tilboð um rúsevni

Sjónvarpskvinnan Lisa Brinkworth spældi leiklutin sum modell, meðan hon arbeiddi við sendingini, sum Donald MacIntyre hevur staðið fyri. Hann hevur áður avdúkað ófriðarkroppar innan fótbóltsheimin við at latast vera ein teirra.

Brinkworth hevur greitt greitt frá, at hon tilboð um rúsevni, og einu ferðina varð hon spurd, um hon kundi veita einum manni eina tænastu í songini hjá honum. Tað vildi hon ikki, men hon heldur, at nógvar av teimum ungu modellunum klára ikki at siga nei til síkar umbønir.

Europeiski stjórin fyri Elite, Gerald Marie, er nógv at síggja í sendingini. Hann hevur verið giftur við tí kendu Lindu Evangelista, og sambært Brinkworth bjóðaði hann sær eina millión lirar, um hon vildi í song við honum.

Sendingin MacIntyre Undercover verður víst í SvF í kvøld.

**ek**



*Rúsevni, rasisma og kynsligt misbrúk av ungum modellum eru partur av mótaheiminum, sum BBC-sendingin avdúkar. Sendingin verður víst í SvF í kvøld*



*Repro-Z gjørdi fyrstu bókina í eini umfatandi bókarøð um ST-londini, og nú er líkt til, at fyritøkan í Havn fær uppgávuna at gera aðrar bøkur í røðini eisini. Mynd: Jens Kr. Vang*

# Skulu gera fleiri bøkur um ST-londini

*Fyrsta uppgávan hjá Repro-Z í umfatandi bókarøðini um ST-londini var so væleydnað, at teir helst skulu gera aðrar bøkur í røðini eisini. Tað eru íslendingar, sum standa fyri útgávuni*

Eyðun Klakstein

Fyri jól kom fyrsta bókin í einum íslendskum milliardaprojekti út í Føroyum. Bókin snúði sum um alskyns viðurskifti í Føroyum, og hon var startskotið til líknandi bøkur um øll ST-londini, sum í løtuni eru 176 í tali.

Tað var fyritøkan Repro-Z í Havn, sum tók sær av at gera bókina klára til prentingar, og hetta arbeiðið eydnaðist so væl, at íslendingar eru hugaðir at lata fyritøkuna gera fleiri bøkur í røðini.

– Bókin um Føroyar vísti, at vit kunnu loysa slíkar umfatandi uppgávur, har nógv fólk er við í arbeiðnum, og har prentingin fer fram í einum landi fjart frá okkum, sigur Allan Skaalum, stjóri á Repro-Z.

Føroyska bókin varð prentað í Slovenia.

Enn er ikki nøkur endalig avtala gjørd um, hvørjar bøkur Repro-Z skal gera afturat, men í løtuni er líkt til, at talan verður um fleiri bøkur.

– Vit hava sagt, at um vit skulu átaka okkum at gera fleiri bøkur, mugu tær verða á einum máli, sum vit skilja, tí tað er ein fortreyt fyri, at vit kunnu gera tað grafiska arbeiðið, sigur Allan Skaalum.

Umframt føroysku bókina er ein bók eisini komin á íslendskum, og næstu tíðina ætla útgevararnir at fáa útgávurnar í fasta legu, so bøkurnar koma í hølunum á hvørji aðrari.

### Stór ætlan

Tað er føroyavinurin Ólafur Gränz, sum stendur fyri útgávuni av bókrøðini um ST-londini, og ætlanin hjá honum kostar fimm milliardir íslendskar krónur, sum svara til eina hálva milliard í okkara pengum.

Ólafur Gränz fekk hugskotið um bókarøðina frá einum vinmanni fyri góðum tveimum árum síðani. Tveir dagar seinni seldi hann sína byggifyritøku, og tók við nýggju avbjóðingini.

Orsøkin til hetta var, at hann vildi fara undir nýggju ætlanina við fullum hjarta, hevur hann áður greitt Sosialinum frá.

Ólafur hevur stovnsett felagið World 2000 HP, og endamálið hjá felagnum er at gera eina bók um hvørt einasta ST-land. Føroyar sluppu eisini upp í part, hóast landið ikki er partur av ST, og tað var tí at íslendingar vildu gera eina sjálvstøðuga bók um Føroyar, heldur enn at lata okkum verða nakrar síður í donsku bókini.

Bókarøðini hjá íslendingum hevur fingið heitið New Millennium Series, og nógv kend fólk hava viðmælt arbeiðnum. Millum annað fólk sum Kofi Annan, Nelson Mandela og Vígdis Finnbogadóttir, sum er formaður í heiðursráðnum fyri bókaráðnum, har fyrrverandi forsætisráðharrin í Írlandi, Mary Robinson, og danski varaformaðurin í ES-tinginum Bertel Haarder er eisini eru limir.

### Eydnaðist til fulnar

Í bókini um Føroyar, sum kom út stutt fyri jól, eru upplýsingar um søgu, mentan, handil, ídnað, politisku skipanina og annað. Haraftturat er ein umfatandi lýsing av øllum kommununum í Føroyum eisini í bókini.

Hugskotið við bókini er at fáa stórar fyritøkur at keypa sær síður í bókunum, og har við skulu pengar frá teimum verða við til at fíggja útgávuna. Í føroysku útgávuni eru ongar fyritøkur við, tí grundarlagið fyri hesum er ikki tað sama, sum í teimum størru londunun, Tí fæst bókin heldur ikkit il keyps í bókhandlum, men hinvegin hava fyritøkur og onnur havt møguleika at ognað sær bókina.

Óla Jákup Rólantsson var ritstjóri á føroysku útgávuni, og Repro-Z hevði prenttilgerðina um hendi.

– Vit kunnu brúka slík arbeiðið, tá vit skulu gera vart við okkum úteftir. Tað krevst nógv, tá slíkt arbeiðið skal gerast, har nógv fólk skriva, taka myndir og annars eru uppi í arbeiðnum, sigur Allan Skaalum, stjóri á Repro-Z.

– Fyrsta bókin var eisini eitt slag av pionerarbeiði hjá okkum, og tað kravdi nógva orku. Men allir lutir í arbeiðnum eydnaðust til fulnar, og tað er helst tað sum ger, at vit nú tosa um at gera fleiri bøkur.

Stjórin á Repro-Z heldur, at tað ber væl til hjá teimum at gera slíkar altjóða uppgávur, tí teknisku møguleikarnir fyri at flyta tilfar elektroniskt eru betri enn nakrantíð.

Mesta arbeiðið, sum Repro-Z ger í løtuni, er í Føroyum, og tað er fyri føroysk viðskiftafólk. Sjey fólk starvast á fyritøkuni.



# Norski frystilínubátur »Urvåg« tikin

*Leygarmorgunin kom »Gormur« á Havnina við norska frystilínubátinum »Urvåg«. Báturin er nú landaður og er hjáveiðuprosentið góð 45 prosent og málið latið fútanum*

ÓLAVUR Í BEITI

Norski frystilínubáturin »Urvåg« var í vikuskiftinum landaður á Havnini, tí Vaktar- og Bjargingartænastan hevur mett at hjáveiðiprosentið er yvir tað loyvda. Vaktarskipið »Gorm« var á Havnini við »Urvåg« leygarmorgunin og farið var beinanvegin undir at landa frystilínubátin.

Klokkan 18.00 sunnukvøldið, tá ið Internetsosialurin hevði Djóna Weihe frá Vaktar- og Bjargingartænastuni í telefonini, vóru teir ikki lidnir at landa »Urvåg«, men Djóni Weihe metti tá, at tað fór helst at verða seint sunnukvøldið. Og nú fyriliggja so tølini frá landingini og vísa tey, at hjáveiðiprosentið hjá »Urvåg« lá beint oman fyri 45 prosent, neyvt 45,04%.

### Ov nógv í lastini

Tað gamla hjáveiðiprosentið var 35 prosent, men eftir nýggju fiskiveiðiavtaluni millum Føroyar og Noregi er hjáveiðuprosentið sett niður á 30 prosent. Hetta er ikki lýst enn, men verður lýst í Kunngerðarblaðnum í hesi vikuni. Orsøkin til, at tað ikki er lýst enn er ikki frá umsitingini, men tí blaðið seinast var beint farið til prentingar, verður sagt frá Fiskimálastýrinum.

Herfyri var eisini annað norsk skip tikið, og tá var roynt at vísa til gamla hjáveiðiprosentið uppá 35 prosent, men tað vinnur helst ikki frama, tí í avtaluni millum Føroyar og Noregi er eingin ivi at hjáveiðiprosentið er 30 prosent, tó at tað ikki er lýst enn í Kunngerðarblaðnum.



*Norski línubáturin varð landaður í Havn sunnukvøldið*



### 178 tons inni

»Urvåg« hevði 178 tons tilsamans, men sambært botnfiskakvotuni hjá norskum skipum undir Føroyum, sum umfatar longu, blálongu, brosmu og upsa, vístu tølini fyri onnur fiskasløg rættiliga nógv oman fyri loyvda hjáveiðiprosent, og er málið nú latið fútanum at taka støðu til, verður sagt frá Vaktar- og Bjargingartænastuni.

*Tað gamla hjáveiðiprosentið var 35 prosent, men eftir nýggju fiskiveiðiavtaluni millum Føroyar og Noregi er hjáveiðuprosentið sett niður á 30 prosent*

# Sjónvarpsstjórin stríddist móti allari yvirtíðini

*– Gjaldføris- og rakstrartrupulleikarnir í seinnu helvt av 1999 kunnu gerast so álvarsligir, at SVF má hava rakstrar- og gjaldførisstuðul fyri at hóra undan til einaferð í mars ár 2000, tá sjónvarpsgjaldið verður SVF í hendi, stendur m. a. í frágreiðingini hjá Grannskoðarafelagnum Rasmussen &Weihe, sum tó endaði við at fleiri fólk eru søgd úr starvi*

ÓLAVUR Í BEITI

Í partinum »Meting av orsøkunum til trupulleikarnar í Sjónvarpinum í 98 og 99« stendur nágreinilig gjøgnumgongd av rakstrinum hjá SVF í frágreiðingini hjá Rasmussen&Weihe. Nevnt verðu um spølini, sum góvu SVF góðar inntøkru og tí ikki ein fastan inntøkukarm at laga útreiðslukarmarnar eftir.

– Ótryggleikin sum altíð vil vera knýttur at handilsligum inntøkum, átti at ført við sær størri varsemi í fíggjarstýringini, verður sagt í frágreiðingini. Inntøkurnar frá 1996 til 97 vuksu við ikki minni enn 45%, og tær minkaðu við 7% frá 97 til 98, og yvir alt tíðarskeiðið 1996-98 vuksu inntøkurnar við góðum 36%. Og rakstrarútreiðslurnar hjá SVF øktust frá 1996 til 97 við 25% og frá 97 til 98 við 13% ella við uml. 42% frá 1996 til 98.

– Gongdin omanfyri vísir, skriva grannskoðararnir, at tann stóri vøksturin í inntøkunum í 1997 hevði við sær ein munandi vøkstur í útreiðslunum. Hóast rakstrarútreiðslurnar ikki vuksu líka nógv sum inntøkurnar, so gjørdi SVF í 97 íløgur, sum svaraðu til munin millum inntøkurnar og rakstrarútreiðslurnar, tí var einki at standa ímóti við, um inntøkurnar fóru at minka í 1998.

### Sum úlvur á skóg

Í frágreiðing síni til mentamálaráðharran, sambært frágreiðingini hjá R&W, sigur stjórin í SVF, at »ferðin varð sett heldur nógv upp tíðliga í 1998«, at »redaktionellar avgerðir vórðu tiknar, sum hava kostað nógv í mun til tað sum er komið burturúr«, at »striltið gekk at tálma nýtsluni av yvirtíðararbeiði« og at »ferðaútreiðslurnar vóru óvanliga høgar í 1998«.

Men Rasmussen&Weihe meta í síni frágreiðing, at »ferðin« helst er sett heldur nógv upp longu í 1997, og í 1998 eru útreiðslurnar eisini øktar, men lutfalsliga ikki so nógv sum í 1997. Og viðvíkjandi yvirtíðini, siga grannskoðararnir, at yvirtíðin nærum tvífaldast frá 1996 til 98, og sama tíðarskeið hækkaðu føstu lønirnar við umleið 40 prosentum, og meðan yvirtíðin sýnist at minka í 1999, so hækka føstu lønirnar eisini í 1999, og grannskoðararnir meta eisini, at lønirnar hækka í ár.

### Spádómur gekk út

Viðvíkjandi gjaldføristrupulleikunum í fyrru helvt av 1999, sum stóðust av ringa úrslitinum í 1998, so vóru teir loystir við eini eykajáttan uppá 1,6 mió. kr. Og so stendur at lesa í frágreiðingini hjá Rasmussen &Weihe:

– Gjaldføris- og rakstrartrupulleikarnir í seinnu helvt av 1999 kunnu gerast so álvarlsigir - hetta er skrivað í november í fjør - at SVF má hava rakstrargjaldførisstuðul fyri at hóra undan til einaferð í mars ár 2000, tá sjónvarpsgjaldið verður SVF í handi.

– SVF gjørdi íløgur í 1997, sum svaraðu til munin millum inntøkurnar og rakstrarútreiðslurnar. Hóast hall áðrenn íløgur í 1998 gjørdi SVF eisini hetta árið íløgur, men tær vóru bert uml. helvtin av íløgunum í 1997. Íløgurnar í 1999 fara, sambært SVF, væntandi at liggja tætt uppat íløgunum í 1998, verður sagt í frágreiðingini hjá Rasmussen &Weihe.

Og sambært frágreiðingini eru allar íløgurnar gjørdar í verkstaðar- og studioútgerð, akfør og edv. Haraftrat eru íløgur eisini gjørdar í nýggja bygningin hjá stovninum.



Skjal 1. Rakstur hjá SVF 96-99

| øll tøl í tkr. | 1999 B | % | 1998 R | % | 1997 R | % | 1996 R |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Inntøkur:** | | | | | | | |
| Sjónvarpsgjald | 15.200 | 14% | 13.281 | 3% | 12.872 | 1% | 12.789 |
| Sektarpeningur | 100 | 85% | 54 | -53% | 116 | 2% | 114 |
| Lýsingar | 4.700 | 26% | 3.720 | 16% | 3.217 | 5% | 3.056 |
| Sjónvarpsspøl | 4.710 | -9% | 5.156 | -27% | 7.054 | | 0 |
| Søla av sjónvarpsbondum | 30 | -73% | 110 | 31% | 84 | -18% | 102 |
| Aðrar inntøkur | 130 | -34% | 197 | 38% | 143 | | 0 |
| | 24.870 | 10% | 22.518 | -4% | 23.486 | 46% | 16.061 |
| Studningur | 0 | | 0 | | 601 | 13% | 530 |
| **Inntøkur íalt** | **24.870** | 10% | **22.518** | -7% | **24.087** | 45% | **16.591** |
| **Útreiðslur:** | | | | | | | |
| *Lønarútreiðslur:* | | | | | | | |
| Lønarútreiðslur tilsamans | 14.399 | 12% | 12.905 | 19% | 10.830 | 18% | 9.215 |
| Yvirtíðarsamsýning | 748 | -46% | 1.391 | 9% | 1.275 | 83% | 696 |
| Arbeiðsmarknaðargjøld | 395 | -23% | 511 | 26% | 405 | 15% | 352 |
| *Lønarútreiðslur í alt* | 15.542 | 5% | 14.807 | 18% | 12.509 | 22% | 10.263 |
| *Aðrar útreiðslur:* | | | | | | | |
| Samsýningar | 120 | -61% | 308 | 122% | 139 | 1% | 137 |
| Verkstaðar- og studioútreiðslur | 500 | -39% | 823 | -13% | 944 | 34% | 705 |
| Plátur og bond | 48 | -83% | 290 | 124% | 129 | 58% | 82 |
| Keyp av tilfarið og sendingum | 1.117 | -29% | 1.576 | 116% | 728 | 60% | 454 |
| Aðrar útr. í samband við sendingar | 710 | -26% | 954 | -45% | 1.728 | 125% | 768 |
| Ferðaútreiðslur | 423 | -58% | 1.015 | 42% | 716 | 90% | 376 |
| Rakstur Akfør | 210 | 6% | 198 | -16% | 237 | 19% | 200 |
| Telefon, telex osv. | 260 | -27% | 356 | 18% | 302 | -5% | 318 |
| Útreiðslur av sendistøðum | 0 | | 0 | | 0 | | 2 |
| Upphavsrættur | 1.243 | 3% | 1.211 | -5% | 1.274 | 11% | 1.146 |
| Húsaútreiðslur | 1.756 | 122% | 790 | -10% | 881 | -1% | 888 |
| Skrivstovuútreiðslur | 113 | -60% | 283 | 152% | 112 | 21% | 93 |
| Postgjøld og frakt av bondum | 180 | -15% | 212 | 53% | 138 | -28% | 193 |
| Tryggingar | 150 | 12% | 134 | -26% | 181 | -46% | 332 |
| Edv-rakstur | 150 | 27% | 118 | -54% | 257 | 12% | 229 |
| Sjónvarpsnevndin | 0 | | 51 | -57% | 120 | 13% | 106 |
| Grannskoðan | 80 | -15% | 94 | 52% | 62 | 13% | 55 |
| Útbúgving | 75 | -19% | 93 | 30% | 71 | -2% | 73 |
| Aðrar útreiðslur | 200 | -18% | 244 | 7% | 228 | 70% | 134 |
| *Aðrar útreiðslur í alt* | 7.335 | -16% | 8.750 | 6% | 8.248 | 31% | 6.291 |
| Útreiðslur íalt | 22.877 | -3% | 23.557 | 13% | 20.758 | 25% | 16.554 |
| **Úrslit áðrenn íløgur** | **1.993** | | **-1.039** | | **3.329** | | **37** |
| Íløga bygningur | 0 | | 1.232 | | 0 | | 0 |
| Íløgur rakstrartól o.a. | 1.750 | 24% | 1.409 | -59% | 3.404 | | 0 |
| **Útreiðslur og íløgur íalt** | **24.627** | -6% | **26.198** | 8% | **24.161** | 46% | **16.554** |
| **Úrslit áðrenn fíggjarpostar** | **243** | | **-3.680** | | **-74** | | **37** |
| Fíggjarinntøkur | 20 | -56% | 45 | -71% | 153 | 34% | 114 |
| **Úrslit fyri árið** | **263** | | **-3.635** | | **79** | | **151** |

Síða 22